# Ársfrágreiðing 2024

Liv uttan harðskap

# Innihald:


**Síða 3** **Inngangur**

**Síða 3** **Brot út forkvinnufrágreiðing**

**Síða 5** **Tøkk til allar stuðlar**

**Síða 6** **Hagtøl**

**Síða 6** **Áheitanir**

**Siða 8** **Gistingar**

**Síða 9** **Kvinnuhúsgrunnurin**

**Síða 10** **Kvinnuhúsfelagið**

**Síða 10** **Sjálvboðið arbeiði**

# Inngangur

Heilt yvirskipað hevur Kvinnuhúsið tvey ymisk tilboð til harðskapsrakt í parlagi og nærsambondum. Talan er um eina *Kreppumiðstøð* fyri harðskapsraktar kvinnur og møgulig børn, og eina ambulanta Ráðgeving *Liv uttan harðskap*, sum er fyri kvinnur, menn og avvarðandi. Umframt hetta hevur Kvinnuhúsið latið ein Vitanardepil upp, sum arbeiðir við at styrkja fakligheit og virksemið fyri harðskapsøkið í Føroyum; at framleiða tilfar til skeið og undirvísing til fakbólkar og markamót til harðskapsøkið.

Á Kreppumiðstøðini kunnu harðskapsraktar kvinnur og børn teirra gista í eitt avmarkað tíðarskeið. Starvsfólk á Kreppumiðstøðini veita holla ráðgeving í samband við, hvussu kvinnur og børn teirra kunnu fóta sær víðari í lívinum, við teimum ymisku hjálparmøguleikum sum finnast.

Hjá Liv uttan harðskap kunnu fólk, sum eru ella hava verið fyri harðskapi í parlagi og nærsambondum, fáa einstaklinga samrøður ella í bólki, luttaka í sjálvhjálparbólki og/ella fáa samrøður hjá sálarfrøðingi. Í 2024 varð skipað fyri tveimum ymiskum sjálvhjálparbólkum. Kvinnur sum eru ella hava verið útsettar fyri harðskapi hittust at deila upplivingar, finna loysnir og at stuðla hvørji aðrari. Tveir ráðgevar í Kvinnuhúsinum vóru við í bólkinum, og løgdu lag á.

Í 2024 vóru kvinnur og møgulig børn, fyri fyrstu ferð boðin inn til skapandi netverk við eftirvernd. Nýggja tiltakið er fyri kvinnur, sum eru ella hava verið útsettar fyri harðskapi, og sum hava havt tilknýti til Kvinnuhúsið. Endamálið við tiltakinum er; at hjálpa og stuðla kvinnunum at sleppa heilt burtur úr harðskapinum, at minka um kensluna av einsemi og at endurskapa netverk. Tiltakið verður boðið áleið 10 ferðir um árið.

Harðskapsraktum tørva ofta stuðul og vegleiðing, og eina gjølla greining av fleiri samansettum trupulleikum. Hetta krevur servitan í hjálpar- og stuðulsmøguleikum, bæði innan almenna- og privata geiran, sum t.d. innan samfelagsliga, sosiala, sálarliga og løgfrøðiliga økið. Við hjálp, vegleiðing og undirvísing kunnu harðskapsrakt fáa størri innlit í egna støðu og teir hjálparmøguleikar sum finnast, eins og styrki til at leggja ætlanir og taka avgerðir, sum passa til teirra tørv og ynskir fyri framtíðina.
Hjá harðskapsraktum kann tað verða trupult at hugsa klárt, at varðveita yvirlitið, og at hava orku til at seta seg í samband við stovnar og myndugleikar. Sjálvsálitið er undir trýsti, og ofta er neyðugt at fáa hjálp til at síggja ymisku møguleikarnar, umframt stuðul til at samskipa bæði privatar og almennar loysnir.

# Brot úr forkvinnufrágreiðingini

## Heildarverkætlan "Harðskapur í parlagi og nærsambondum 2023 – 2028"

Heildarverkætlanin inniheldur 20 átøk, har Kvinnuhúsið er ein partur av teim flestu.
Í 2024 kom nýggur faldari út, sum gevur upplýsingar til tilflytarar, og serliga vendir sær til útlendskar kvinnur við uppihaldsloyvi í Føroyum. Hesar kvinnur hava í nógvum føri ikki somu

sosialu trygdarskipan, sum føroyskar kvinnur vanliga hava. Fleiri kenna ikki nokk til føroyska samfelagsbygnaðin, hvørji rættindi tær hava, og hvørjar myndugleikar tær kunnu seta seg í samband við, um tær eru fyri harðskapi.
Faldarin finst á seks málum: *enskum, filipinskum, rumenskum, sponskum, thai og ukraniskum.* Kvinnuhúsið, Sig frá/Almanna- og mentamálaráðið og Útlendingastovan hava staðið fyri arbeiðinum at gera nýggjan faldara (átak 5).

"Skapandi netverk við eftirvernd" er eitt nýtt tilboð, sum er ætlað kvinnum við ella uttan børnum, sum eru ella hava verið útsettar fyri harðskapi og sum hava havt tilknýti til KVH. Fleiri kvinnur hava havt gleði av hesum tilboðið í 2024. Sum ein kvinna segði: "*tað er so gott at møta øðrum vanligum kvinnum, sum eisini hava verið útsettar fyri harðskapi, og sum eru komnar longri enn eg*" (tann rætta vegin) (átak 8).

Orðaskifti var um heildarverkætlanina í Tinginum, allir flokkar bóru fram sína hugsan um verkætlanina og/ella harðskapsøkið. Nógv áhugavert og í høvuðsheitum positivt kjak var um evnið.

Á sumri 2024 varð søkt eftir kandidati til verkætlanarstarv at byggja upp nýggjan vitanardepil í Kvinnuhúsinum. Stórur áhugi var fyri starvinum, Rakul Dalsgaard-Jakobsen fekk starvið og byrjaði 1. oktober 2024. Rakul er útbúgvin sosialráðgevi og kandidatur í sosialum interventiónum (átak 18).

## Samstarv og harðskapfaklig vitanardeiling

Ráðgevar hjá Kvinnuhúsinum hava hildið upplegg fyri fakfólki á t.d  starvsfólkafundi. Havt sparrings-netfund við kreppumiðstøð í Danmark serliga í mun til arbeiði við børnum, og hava verið á skeiðið hjá Danner í Keypmannahavn.

Kvinnuhúsið hevur havt nógva vitjan, sum t.d av Sirið Stenberg og grønlendsku javnstøðumálaráðfrúu Naaja H. Nathanielsen, av integratiónssamskipara í Tórshavnar kommunu um samstarv millum Kvinnuhúsið og Altjóðahúsið, og Danner, sum høvdu upplegg fyri vaktum hjá Kvinnuhúsinum.

Í novembur vóru trý skeið hildin har 80 fakfólk, breitt umboðandi føroyskar myndugleikar og stovnar luttóku. Undirvíst varð innan evni um, hvussu fakfólk kunnu skilja og stuðla fólki, sum hava verið fyri harðskapi í parlagi ella nærsambondum. Anne Zacho Møller og Karen Boesen frá Danner undirvístu. Tað vóru Sig frá-verkætlanin og Kvinnuhúsið, í samstarvi við Nám, sum skipaðu fyri.

## Altjóða dagur ímóti harðskapi móti kvinnum 25. november

Dagurin varð hildin í Norðurlandahúsinum, og evnið var: Sálarligur harðskapur. Evnið er sera aktuelt, tí arbeitt verður við at kriminalisera sálarligan harðskap og tráfylging. Eftir ætlan verður lógarbroytingin í revsilógini klár til 2025. Tvær fakligar framløgur vóru, og samrøða við føroyska kvinnu, sum hevur livað við sálarligum harðskapi. Samrøðan snúði seg um at vera barn í einum

heimi við harðskapi og hvussu hesar umstøðurnar hava ávirkað lív hennara.

### Húsabólkurin
Arbeiðið í húsabólkinum hevur fylgt nógv síðsta árið – “hvussu kunnu vit framtíðartryggja virksemi hjá Kvinnuhúsinum á bestan hátt.”
Virksemið hjá Kvinnuhúsinum er nógv økt og økist í hvørjum, so vit hava ov fá høli - og umstøðurnar hjá kvinnum og børnum, sum gista á Kreppumiðstøðini treingja veruliga til dagførðing. Nógv fundarvirksemi hevur verið við Almannamálaráðið, Landsverk, arkitekta stovu, løgfrøðing og KFUM, sum tó ikki bar á mál. Arbeitt verður víðari við at framtíðartryggja virksemi hjá Kreppumiðstøðini, Kvinnuhúsinum, Liv uttan harðskap, Vitanardeplinum og eini komandi Hotline.

### Samanumtikið
Stuttligt er at minnast aftur á, at á Altjóða degnum ímóti harskapi móti kvinnum í 2023 var evnið: “Frá græsrótarørslu móti professionalismu”. Mín fatan er, at vit eru væl á veg á leiðini at proffesinalisera harðskapsøkið. Fleiri hava fingið størri innlit í harðskapsfakliga økið. Vit kunnu vera errin av okkara starvsfólkum, sum áhaldandi søkja sær vitan og oysa út av henni. Starvsfólkini hjá Kvinnuhúsinum hava eisini verið góðar til at økja um fakliga førleikan hjá teimum 35 sjálvboðnu vaktunum, sum eru við til at gera tað møguligt, at harðskapsraktar kvinnur og børn teirra kunnu fáa hjálp um kvøldið og í vikuskiftum alt árið.

## Gávur og vælvild
Kvinnuhúsið hevur fingið fleiri gávur og sýndan áhuga í at stuðla okkara arbeiði. T.d børugávu, stuðul frá Jólamerkjagrunninum til at hugna um børnini á Kreppumiðstøðini í desember mánaða, og frá blaðnum Kvinna. Nakrar kommunur valdu at stuðla, og Barnahjálpargrunnurin hevur stuðlað - børnum til gagns.

## Tøkk til allar stuðlar
Vit vilja nýta høvi til at takka fyri alla vælvild og stuðul, sum Kvinnuhúsið annars hevur fingið. Tað veri seg við samstarvi, ráðgeving, regluligari sparring, fíggjarligum stuðli og gávum. Ein stór tøkk til Føroya Landsstýri, kommunur, grunnar, felagsskapir, myndugleikar, fyritøkur og einstaklingar. Takk til miðlar og fjølmiðla fólk fyri regluliga at taka tráðin upp og varpa ljós á harðskap. Vit fegnast um at uppliva eina størri almenna tilvitsku um harðskap í parløgum og nærsambondum. Bæði tilvit og vitan um ymisku sløgini av harðskapi økist á henda hátt í samfelagnum.
Tøkk til okkara sjálvboðnu kvinnur, sum taka eina serliga ábyrgd og hond um aðrar kvinnur og børn teirra, ið hava upplivað ella liva við harðskapi.
Eisini ein tøkk fyri politiskt uppmerksemi og vælvild, og at Kvinnuhúsið verður tikið við, tá átøk eru, sum arbeiða fyri at betra møguleikarnar hjá vaksnum og børnum, ið hava verið fyri harðskapi í parlagi og nærsambondum. Hetta er við til at halda arbeiðnum uppi til at basa harðskapi.

# Hagtøl

Fyri at skjalprógva tørvin á Kvinnuhúsinum, og fyri at kunnu arbeiða meira málrættað við teimum avbjóðingum, sum harðskapsrakt hava – verða hagtøl skjalfest yvir allar áheitanir til Kvinnuhúsið. Vit hava ført hagtøl síðan fyrstu áheitan í 1990. Hagtølini eru navnleys, og persónar kunnu ikki kennast aftur. Tølini snúgva seg um vaksin, um ikki annað er upplýst.

## Áheitanir í 2024

Met nógvar áheitanir vóru til Kvinnuhúsið í 2024, í alt 1.409. Av hesum snúðu 850 seg beinleiðis um harðskap. Hinar 559 áheitanirnar snúðu seg millum annað um samstarv, fyrispurningar, uppgávur/verkætlanir, miðlar og vitjanir.
Av teimum 850 áheitanunum um harðskap vóru 825 áheitanir frá kvinnum og 25 frá monnum. Tað er oftast tann harðskapsrakti sjálvur, ið vendir sær til Kvinnuhúsið, men í summum førum er tað Almannaverkið (5), lækni (40), løgregla (3), sálarfrøðingur (8), familja/vinir/arbeiðspláss (127).

Niðanfyri standandi hagtøl byggja á tær 850 áheitanirnar frá harðskapsraktum, ið ynsktu at gera brúk av teimum tilboðum Kvinnuhúsið bjóðar.

| | |
|---|---|
| 498 | áheitanir úr bý |
| 106 | áheitanir av bygd |
| 010 | áheitanir úr útlondum |
| 236 | áheitanir vóru ikki upplýstar |

Kvinnuhúsið hevur gjøgnum árini fingið áheitanir úr øllum kommunum í Føroyum. Á hvørjum ári eru eisini nakrar áheitanir frá útlondum.

## Orsøk til áheitanina

Sami persónur kann hava vent sær fyri fleiri trupulleikar, tí samsvarar talið av áheitanum ikki við talið av orsøkum.

| | |
|---|---|
| 225 skyldast | Likamligan harðskap |
| 781 | Sálarligan harðskap |
| 259 | Hóttanir um harðskap |
| 144 | Fíggjarligur harðskapur |
| 044 | Materiellur harðskapur |
| 024 | Annar harðskapur (t.d. útleigari, arbeiðsgevari o.o.) |
| 080 | Stalking |
| 056 | Kynsligur ágangur / blóðskemd |
| 010 | Neyðtøka |
| 001 | Fosturtøka |
| 058 | Separatión |
| 057 | Hjúnaskilnaður |

| | |
|---|---|
| 004 | Barnapeningur |
| 028 | Foreldramyndugleiki |
| 070 | Samverurættur |
| 010 | Búskapur |
| 022 | Bústaðarviðurskifti |
| 129 | Ymisk mentan |

## Úrslit av áheitanini

Kvinnuhúsið bjóðar, umframt samrøður við harðskapsrakt um harðskap og upplivingar av hesum, eisini holla ráðgeving og vegleiðing um praktisk og búskaparlig viðurskifti í samband við, hvussu harðskapsrakt kunnu koma víðari og fóta sær. Ráðgevar í Kvinnuhúsinum hava virkan leiklut at samskipa samstarvið við privatar og almennar stovnar og myndugleikar s.s. Almannaverkið, Rættarhjálp Føroya, løgfrøðing, Familjufyrisiting, peningastovnar, Útlendingastovu, Barnarvernd, løgreglu, lækna ella viðgerðarstovn.

## Aldurin á kvinnunum

| | |
|---|---|
| 124 | 20 – 29 ár |
| 307 | 30 – 39 ár |
| 131 | 40 – 49 ár |
| 151 | 50 – 59 ár |
| 050 | 60 ár og eldri |
| 087 | Ikki upplýst |

## Aldurin á monnunum

| | |
|---|---|
| 005 | 30 – 39 ár |
| 008 | 40 – 49 ár |
| 007 | 50 – 59 ár |
| 005 | Ikki upplýst |

## Børn

Tær 825 kvinnurnar høvdu tilsamans 1.344 børn.

Aldurin á børnunum:

| | |
|---|---|
| 080 millum | 00 – 02 ár |
| 249 | 03 – 06 ár |
| 208 | 07 – 10 ár |
| 096 | 11 – 14 ár |
| 098 | 15 – 18 ár |
| 483 | Yvir 18 ár |
| 130 | Ikki upplýst |

### Tann, ið fremur harðskapin

| | |
|---|---|
| 242 | Makin |
| 307 | Fyrrverandi makin |
| 019 | Foreldur, systkin ella børn |
| 042 | Onnur |
| 215 | Ikki upplýst |

## Gistingar

11 kvinnur og 14 børn hava gist á Kreppumiðstøðini í 2024. Av hesum gistu 3 kvinnur fyri fyrstu ferð, 4 fyri aðru ferð og 2 fyri triðju ferð. Ikki upplýst 2.

### Gistingardøgn (vaksin + børn)

Kvinnur og børn hava gist á Kreppumiðstøðini í tilsamans 649 samdøgur. Kvinnurnar gistu í 250 samdøgur og børnini í 399 samdøgur.

| | |
|---|---|
| 02 kvinnur | 01 – 07 samdøgur |
| 02 | 07 – 14 samdøgur |
| 03 | 14 – 28 samdøgur |
| 04 | 30 – 60 samdøgur |

### Aldur

Kvinnurnar vóru í aldursbólkunum frá 20 – 59 ár.

| | |
|---|---|
| 02 millum | 20 – 29 ár |
| 04 | 30 – 39 ár |
| 04 | 40 – 40 ár |
| 01 | 50 – 59 ár |

### Aldur á børnunum

Børnini vóru millum 2 og 14 ár.

| | |
|---|---|
| 02 millum | 00 – 03 ár |
| 05 | 03 – 06 ár |
| 04 | 07 – 10 ár |
| 03 | 11 – 14 ár |

Tað eru oftast tey smærru børnini, ið gista saman við mammuni. Kvinnurnar gjalda 50 kr. fyri gisting pr. samdøgur. Haraftrat skulu tær sjálvar keypa og gjalda fyri mat.

### Flyting av Kreppumiðstøðini

| | |
|---|---|
| 05 | til nýggjan búðstað |
| 01 | heimaftur – makin flutti út |
| 05 | annað |

### Harðskapurin

| | | |
|---|---|---|
| 06 | kvinnur | hava verið fyri likamligum harðskapi |
| 11 | | hava verið fyri sálarligum harðskapi |
| 09 | | hava verið fyri hóttanum |
| 06 | | fíggjarligum harðskapi |
| 02 | | materiellum harðskapi |

### Melda til løgregluna

| | |
|---|---|
| 03 | fer ikki at melda |
| 05 | vilja melda |
| 03 | ikki upplýst |

### Orsøk til harðskapin

Kvinnurnar siga, at orsøkin til at maðurin fremur harðskap er:

| | |
|---|---|
| 01 | partvís uppvøkstur |
| 10 | ikki upplýst |

### Hvør fremur harðskapin

Fremjarin er úr øllum samfelagsstættum og í øllum aldursbólkum.

| | |
|---|---|
| 09 | hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 01 | fyrrverandi hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 01 | annar (foreldur, systkin ella børn) |

## Kvinnuhúsgrunnurin

### Búskapur

| | |
|---|---|
| Inntøkur: | Kr. 2.856.584 (Landstýri, kommunur, gisting og annar stuðul) |
| Útreiðslur: | Kr. 2.779.615 (Kreppumiðstøðin, rentir og granskoðan) |
| Eginpening.: | Kr. 3.892.455 (Uppsparing til hús) |

### Kvinnuhúsið/Kreppumiðstøðin

| | |
|---|---|
| Inntøka: | Kr. 3.442.733 |
| Útreiðslur: | Kr. 3.363.928 |

Kreppumiðstøðin leggur rakstarætlan fyri komandi ár fram fyri Grunnin. Síðani játtar Kvinnuhúsgrunnurin pening til rakstur av Kreppumiðstøðini.

## Kvinnuhúsfelagið

**Limafundir:** Sjálvbodnu vaktirnar hava høvi at hittast, samskifta, geva og fáa íblástur. Á limafundunum hava umboð fyri Kvinnuhúsið framløgur. Eisini verða einstaklingar, stovnar ella myndugleikar bodnir at greiða frá evnum, sum hava markamót til harðskapsfakliga økið.

**Konuveitslan:** 29. januar fyllir Kvinnuhúsfelagið ár. Í hesum sambandi bjóðaði felagið sjálvbodnu vaktunum ein góðan bita í Mettustovu. Hetta er ein tøkk fyri ólønta arbeiðið.

## Sjálvboðið arbeiði

### Arbeiðsbýti

| | |
|---|---|
| 35 | náttar- og vikuskiftisvaktir |
| 05 | nevndin í felagnum + 2 eykalimir |
| 03 | nevndin í grunninum + 2 eykalimir |

Arbeiðsøkið er býtt millum 35 kvinnur. Hesar eru býttar í 5 bólkar, 7 vaktir í hvørjum bólki. Hetta ger, at man sum sjálvboðin hevur eina forvakt og eina bakvakt 5. hvørja viku. Á henda hátt eru altíð tvær kvinnur á vakt alt samdøgrið
Okkara upplýsingar vísa, at sjálvbodnu vaktirnar, í allarflestu førum, eru kvinnur, ið eru virknar á arbeiðsmarknaðinum.

### Sjálvbodnir arbeiðstímar pr. ár

| | |
|---|---|
| 10.950 | náttarvakt (15 t. x 365 dg. x 2) |
| 01.116 | vikuskiftis- og høgtíðsvakt (9 t. x 62 dg. x 2) |
| 00.450 | limafundir (2 t. x 9 mðr. x 25 pers.) |
| 00.150 | nevndarfundir (3 t. x 10 mðr. x 5 pers.) |
| 00.024 | grunnurin (2 t. x 4 fund x 3 pers.) |
| **12.690 t.** | **Í alt** |

Tlf. 31 72 00
post@kvinnuhusid.fo

Tlf. 32 00 32
post@livuttanhardskap.fo

www. kvinnuhusid.fo
Kvinnuhúsið – Kreppumiðstøðin er á Facebook og Instagram,
og Liv uttan harðskap er á Facebook